# STARVSLÝSING



## Avloysari fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi

Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir starvsfólki til Búnaðarstovuna at byrja 18. januar 2010 og árið út.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Telefonavgreiðslu
- Málsviðgerðarhjálp
- Annað vanligt skrivstovuarbeiði

Umframt at tú ert fyrikomandi og fryntligur perónur, sum dugir væl at samskifta við viðskiftafólk, er krav at tú hevur
- útbúgving og royndir innan skrivstovuyrki
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Búnaðarstovuna.

Umsóknir við møguligum prógvum, viðmælum o.ø. verða at senda okkum. Umsóknarfreistin er 2. januar 2010.

**BÚNAÐARSTOVAN**
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20 • bst@bst.fo • www.bst.fo





Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo


*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*
Frúutrøð 1 · Postboks 353 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 302472
Fax 302471 · kvoldskulin@torshavn.fo · www.kvoldskulin.fo

## Nýggj skeið í Kvøldskúlanum í vár

**Treytað av myndugleikagóðkenning og nóg stórari undirtøku bjóðar kvøldskúlin fram hesar lærugreinir á vári 2010:**

**Motorlæra/bát**
Tú fær m.a vitan um, hvussu bátamotorin virkar, hvussu tú umvælir hann og um neyðuga røkt
**Lærari:** Jón Heðin Tróndheim
**Tíð:** 10 hósdagar kl. 19.00 - 21.35
**Stað:** Tekniski skúli
**Næmingagjald:** 540 kr

**Kreativt maskinbroderí fyri byrjarar**
Tú lærir m.a, at brodera myndir, taskur, prýðislutir, prýði og klæðnapløgg. Vit brodera við seymimaskinu uttan at nýta tøkni(program). Maskinur eru til taks á skeiðnum.
**Lærari:** Malan Rubeksen
**Vikuskiftisskeið:** 15.-16. jan., 29.-30. jan., 12.-13. feb., 26.-27. feb., 12.-13. mars
**Allar dagar:** Fríggjadag kl. 19.00-21.35 og Leygardag kl. 10.00-15.20
**Stað:** Seymistovan í Venjingarskúlanum
**Næmingagjald:** 630 kr

**Lívsdygd á ellisárum**
Les meira um innihaldið í skeiðnum á heimasíðu skúlans: www.kvoldskulin.fo
Lærari: ymiskir lærarar við servitan á hvør sínum øki.
**Tíð:** 18. jan. 25. jan. 1. feb. 8. feb. 15. feb. 22. feb. og 1. mars. T.e. 7 mánadagar kl.19.00–21.35
**Stað:** Posthúskjallarin
**Næmingagjald:** 490 kr

**Persónlig vælvera og røkt**
Tú lærir m.a., at reinsa húðina, peeling, masku og dag- og náttkrem umframt hondviðgerð / manicure og at fíla negl.
**Lærari:** Mariann Johannesen
**Tíð:** Tað er 2 skeið at velja ímillum. Vel tær annaðhvørt 1) 4.-5. og 6. feb. ella 2) 4.-5. og 6. mars.
(hósd. og fríggjadag kl.19.00- 22.00; Leygardag kl. 11.00-16.00)
**Stað:** Posthúskjallarin
**Næmingagjald:** 430 kr

**Telduskeið fyri eldri, byrjanarskeið**
Endamálið er at læra eldri fólk at nýta telduna sum hent amboð í gerandisdegnum. Tú lærir m.a. um tekstviðgerð, at nýta internetið- og teldupost til samskifti við onnur. Nortið verður eisini við samskifti umvegis Skype og at brúka telduna til peningaflutning.
**Lærari:** Arne Thorsteinsson
Vikuskiftisskeið – 8.-10.jan, 15.-17. jan, 22.-24. jan., 29.-31. jan. og 5.-7. feb.
**Allar dagar:** Fríggjadag: 15.30 -19.00; Leygardag: 09.00 – 12.30 og Sunnudag: 14.00- 17.30
**Stað:** Skúlin í Hoyvík, Teldustovan
**Næmingagjald:** 720 kr

**Urtagarðsrøkt**
Ætlanin er at bjóða eitt skeið í urtagarðsrøkt, sum summarskeið. Nærri verður lýst seinni.

Tilmelding er umvegis heimasíðu okkara www.kvoldskulin.fo
Seinasta freist at tekna seg er sunnudagin 4. januar.
Næmingagjaldið verður goldið í sambandi við tilmelding .
Um treytir og mannagongd fyri tilmelding, sí vegleiðing á heimasíðuni.

*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*



Lýsing er stuðlað av Sosialinum

*Coco leitar eftir nýggjari familju*

Coco er ein Border collie/Lab blanding, hon er 2½ ára gomul, rólig, barnavinarlig.

Hevur tú hug at geva Coco eitt gott heim ring á tlf. 50 45 33.

Vinarliga
Djóraverndarfelagið

www.dvf.fo

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ

# VASKIFÓLK
## til Kvívíkar skúla

Søkt verður eftir vaskifólki til Kvívíkar skúla, at byrja 18. januar 2010.

Arbeiðstíðin er 3 tímar um dagin (frá kl. 15).

Løn v.m. sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi 4. januar 2010

**Kvívíkar Kommuna**
Víkavegur 4 · FO-340 Kvívík
Tlf. 772400 · Borgarstjórin 772402

Zarepta



## Bíbliugransking í Zarepta millum jól og nýggjár

Farið verður vestur sunnukvøldið 27.12, kl. 18 og heim aftur mikukvøldið tann 30.12.09

**Evnir:**
Ávøkstur · Torfør skriftstøð · Galatiabrævið · o.a.

Áhugað verða biðin um at tekna seg innan fríggjadagin tann 18.12.09, á tlf. 737398 ella 212662